LØGTINGIÐ

Mentanarnevndin

Løgtingsforkvinnan

2. november 2023
hm/ód

Leingjan av freist til framløgu av áliti í teimum málum, sum eru í Mentanarnevndini

Nevndarformaðurin fer at heita á løgtingsforkvinnuna um at leingja freistina sbrt. § 32, stk. 2 í Tingskipanini viðvíkjandi teimum málum, sum eru í Mentanarnevndini, til fríggjadagin 17. november 2023.

Nevndin er liðug við hoyringarnar í málunum, men er nú í holt við at senda landsstýrismanninum í barna- og útbúgvingarmálum nakrar skrivligar spurningar at svara nevndini skrivliga fyri at fáa greiðu á nøkrum ítøkiligum viðurskiftum í sambandi við málini. Tá landsstýrismaðurin hevur svarað nevndini, verða álit skrivað.

Málini, ið talan er um, eru hesi:


Løgtingsmál nr. 26/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan
(Góðkenning av flutningsskipanum og landskassastudningur til útreiðslur av góðkendum flutningsskipanum verða strikað)
Málið var til 1. viðgerð 6. oktober 2023.

Løgtingsmál nr. 27/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yrkisútbúgvingar (Broyting í áseting um lønarendurgjald til læruplass)
Málið var til 1. viðgerð 6. oktober 2023.

Løgtingsmál nr. 28/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul
(Broyting í javning av stuðulsupphæddum)
Málið var til 1. viðgerð 6. oktober 2023.

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

Vegna nevndarformannin



Hallur Markná
nevndarskrivari